


# Kinesari hug at keypa part av Svalbard

**Jan Müller**

14.05.2014 - 14:04

Oljan.fo

Ein múgvandi kinesari er sinnaður at gjalda 111 milliónir dollarar fyri eitt øki á Svalbard, sum er til sølu.

Sum skilst er tann ríki kinesarin Nubo Huang ikki tann einasti, sum hevur víst økinum á Svalbard áhuga, tí aðrir útlendingar og einstakir norðmenn sigast eisini liggja framvið.

Nubo Huang hevur bjóðað sær til at gjalda 111 milliónir amerikanskar dollarar fyri økið, sum er við Austre Adventsfjord, og sambært tnp.com er ætlan hansara at gera eitt ferðavinnupláss har.

Nubo Huang er nevndarformaður í Beijing ZhongkunInvestment Group Co. Ltd, sum hevur gjørt íløgur í fleiri av teimum størstu verkætlanunum í Kina.

Willy Østreng í Norsk Vitenskapsakademi for Polarforskning heldur, at tað eru náttúrutilfeingið og komandi sjóvinnumøguleikar, sum hava fingið tann ríka kinesaran at

venda eygunum ímóti Svalbard. Sjálvur heldur Willy Østreng, at málið snýr seg ikki bara um jarðarhandil, men at hetta eisini er eitt trygdarpolitiskt mál. Norska vinnumálaráðið hevur sagt, at tað er í lagi at selja lendið, men at tað skal gerast innan fyri Svalbard-sáttmálan og ta serligu Svalbard-lógina.

Tað eru trý systkin í Noregi, sum eiga tann partin av Svalbard, sum er lýstur til sølu